**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag - Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Hvussu vit blivu interdott komm býtt!



TÍÐARGREININ
*Agga Niclasen*
*meining@meyl.fo*

**Alnetið hevur nú tikið seg fram sum misljómandi tónleikur grundaður á eina óstýriliga, einstaklinga-dyrkandi, oftani navnleysa og einkisverda meining, har øll tosa samtíðis, men har eingin lurtar.**
**Heldur enn eina heimsfevnandi ravtøknibygd, klovnar alnetið samfelagið í fleiri trilliónir av ótolandi vinarbygdum, ið saman dragsa tað afturum upplýsingartíðina, ja heilt aftur til myrku miðøldina, har allur sannleiki er persónligur og øll vitan staðbundin**

Ein morgun í august, aftaná at hava hugt at olympiaduni í Peking fýra tímar út í eitt, fataði eg, at tað var tíð uppá at stoppa, tá ið danska frásøgufólkið nærum geylaði: "Wauw, det her er et utroligt øjeblik i algiersk judohistorie!"

Eitt syrgiligt lív hjá syrgiligum persóni, heldur onkur ivaleyst. Og jú, kanska, hasum at døma eftir. Men so ikki í námind av eins syrgiligt sum hasi, ið halga bróðurpartin av síni frítíð til fják og fjas á guddómliggjørda alnetinum.

Hasi, hvørs vitborna íkast ikki røkkur longur enn My Space, har hetta er at lesa: "Ja, for fanin!!! Eg gron? Nei tú, gladness, no sadness, bu-mævir!!! Hehe nei, eg fór í brús og so í song. Skuldi jú til arbeiðis í morgun... Annars mega langt síðani og takk fyri addið=)"

Sjálvur, andlit til andlits við slíkum, ja, tosi, hugsi eg, standi eg sum fýra feit spurnartekin???? Alnetið er ikki bert endað í einum goggutum villfárilsi, har mál og meining er vorðið devaluerað til standin í primitivasta Afrika, men verður hon harafturat av alsamt fleiri skoðað við gudiligum nærlagni.

Hasi, hinvegin, ið ivast um alnetið, ið halda, at hon er eitt moralskt, búskaparligt og mentanarligt krypilsmenni, verða ósvitaliga stemplað sum fráfallin.

Mítt egna fráfall er uppaftur meiri trúvilst, av tí at eg ditti mær at seta spurning við tí mest halgaðu sannføringina: at tað nettupp er moralskt, búskaparliga og mentanarliga gott at hava tøknifrøði, ið loyvir sjálvt teim mest skítbýttu at stjórna sína egnu skriving, tónleik og filmar á alnetinum.

Hasi, ið eru meiri trábitin av at hugsa um hvat onnur halda um teg og tíni um apsalutt einki ella, í besta føri, um tú nú heilt sikkurt heldur tað sama sum tíni vinfólk, eitt nú tá ið tað kemur til karikaturarnar av Muhamed, ístaðin fyri at finna útav — umvegis alnetið! — hvat ein kapasitetur sum Salman Rushdie heldur um tær, øtast óivað.

Hesir títtum so sera ósjálvstøðugu einstaklingar, og serliga á rørsluorienteraða vinstrivonginum, ið tilvitað tvinga seg sjálvar at halda tað sama um alt, eru so vígdir til nýligu kollveltingina innan teldunýtslu, at skeptikarir sum eg vera skírdir "ómodernaðir".

Men hvat hesir addandi My Space-frikar ikki vita, er tað, at sovorðið sum at avbjóða elskaðar fatanir, siðvenjubundna hugsan, at seta menniskjað framum státin, at støðugt ílegubetra menniskjað, at trúgva uppá fullkomiligt talu- og skrivifrælsi og aðramáta at vera sannførdur um, at narko skal løggildast hjá státinum at metta marknaðin undir skipaðum viðurskiftum, tað er ikki ómodernað, men promodernað.

Og ikki at klemma einhvørja menning, einhvørja gongd, eitthvørt rák—hvussu óundansleppandi, narsisistiskt og tápulyggað hetta enn mátti verið— er heldur ikki ómodernað.

Hugsjónin um eitt sjálvgjørt alnet er aðramáta kend sum Web 2.0-kollveltingin, ið lýsir skiftandi rákið at brúka alnetið at styrkja kreativitet og samskifti. Og soleiðis syrgja heimasíður sum You Tube, My Space, Facebook og bloggar eftir øllum at døma fyri at demokratisera okkara mentan við at loyva hvørjum Hanus og Janus at skapa og stjórna sítt egna tilfar á alnetinum.

Mítt egna fráfall, ella grundin til at eg eftir øllum at døma eri ómodernaður, kemst minst líka so nógv av tí, at eg hvørki eri á My Space ella Facebook, sum tað, at eg vil vísa á, at sjálvgjørt tilfar á aletinum er ringt. Eg haldi enntá, at heldur enn at fáa fólkaræðið at spretta, førir Web 2.0 til samfelagsligt og moralskt fall.

Sjálvandi, í sjálvum sær er einki skeivt við hvørki sjálvbragdan ella sjálvstýrandi tøkni, eiheldur kreativiteti, hvørki á ella uttan fyri alnetið. Trupulleikin, tó, er tá ið Web 2.0 verður idealiserað sum ein máti at mata burturundan veruligt og viðurkent talent og lata góðvarnar online-amatørar loysa veruligar serfrøðingar við veruligum vísdómi og meiningum av.

Demokratiski dreymurin hjá fólkunum handan My Space og Facebook er tíansverri vorðin til okkara kollektiva marra. Tann ógvusligi populariteturin, ið kringar Web 2.0, merkir, at alt tað, sum á sinni var kult, og hoyrir amatørum til, nú hoyrir høvuðsrákinum til, og er í álvara við til at býttisgera okkara mentan.

Alnetið nú á døgum er sansaleyst fólkaræði—ótonkt tilfar til ávirkiligar og vinglutar einstaklingar. Tað eru nú ein asins rúgva av ókeypis bloggum, You Tube-sjónbondum og Facebook-síðum, sjálvt ókeypis sjálvgivnum porno, men alsamt minni av myndigum og stílskum tilfari á alnetinum.

Frá byrjuanrtíð at hava verið ein fráskilakjansur at kanna sær vitan við at leita fram upplýsingar frá fólki, dagbløðum og viðurkendum stovnum við faktiskum tankum, er alnetið nú ein samkomustaður steinstappaður við ætlandi nútíma fólki, ið halda, at Ground Zero bumbusikkurt er eitt nýkomið og gátuført telduspæl.

Demokratiskir analfabetar, ið halda, at verðin melur í klingur um seg og síni uttan at geva lokalsamfelagnum, og so slettis ikki aðrari og viðurkendari vitan, nakran sum helst ans. Narsisistiskir tankaloysingar, ið halda, at tað, at røkta og 'uppdeyta' seg sjálvan, sín "profil", sínar tankaleysu vinir og upplýsingar frá hesum — so at tryggja sær, at øll við vissu nú eisini halda tað sama um alt— er at liva.

Alnetið hevur nú tikið seg fram sum misljómandi tónleikur grundaður á eina óstýriliga, einstaklingadyrkandi, oftani navnleysa og einkisverda meining, har øll tosa samtíðis, men har eingin lurtar. Heldur enn eitt fólkaræðisligt utopia av kreativum amatørum, førir henda sjálvshevjandi alnetskollvelting ístaðin til massafávitsku og eina almannamentan av talgildari narsisismu.

Bæði sum orsaki og í síni ávirkan av framburðinum hjá radikalum fólkaræði, Web 2.0-kollveltingin at navni, er hevdbundið meritokrati av royndum og vitugum serfrøðingum og ekkaleysum meiningarmyndarum í kreppu.

Álvarabløð siga upp alt fleiri hegnigar og akademiskt skúlaðar journalistar fyri síðani at seta í starv innihaldsleysar og akademiskar analfabetar, ið skíra seg "journalistar" sum klaktir av Danmarks Journalisthøjskole og líknandi amatørskúlum.

Háskúlalærd fólk, ið halda, at tað, at vera kritiskur og tað, at kritisera, er eitt feitt, men sum kortini væl finna útav at pota nyttuleysar tíðindastubbar út á blaðsins heimasíðu, men sum hvørki hava førleikan at muta ímóti síni egnu skandalukendu redaktión kjaftfull við persónsskvaldri og aðrari líkasælu ella sínum betri skúlaðu politikarum.

Men eisini bóka- og musikkútgevarir eru fallkomnir. Ja, sjálvt bókavørðar trilva eftir eini virðiligari undankomu sum úrslit av Web 2.0, sum í sjálvum sær ikki er nøkur pengamaskina, av tí at næstan alt tilfar er ókeypis. Størsti taparin í hesi mentanarligu umskapan er sostatt, umframt fólkaræðið, tann siðvenjuligi kreativi klassin — professionellir tónleikarir, filmsskaparir, teknarir og so veruligir journalistar — ið stríðast við at monetisera sínar gávur og lærdóm í einum lýsingarmettaðum búskapi, har tær stóru upphæddirnar verða leiddar til tøkniveitarar sum You Tube og My Space.

Kunnleiki og sannleiki verða vend upp og niður av nútímans nýtslu av alnetinum. Aletið skuldi ætlandi vera ein staður, vit foru fyri at verða skúlað av partleysum serfrøðingum og skikkaðum kjakarum um eina ópersónliga verð uttanfyri okkum sjálvi, okkara kunningar og vitan. Men alnetið í dag er vorðin ein leinging av tí "persónliga rúminum", har vit faktiskt sjálvi varpa okkum út til vinfólk ístaðin fyri at læra frá fremmandum.

Heldur enn eina heimsfevnandi ravtøknibygd, klovnar alnetið samfelagið í fleiri trilliónir av ótolandi vinarbygdum, ið saman dragsa tað afturum upplýsingartíðina, ja heilt aftur til myrku miðøldina, har allur sannleiki er persónligur og øll vitan staðbundin.

So, hvat er at gera? Eg eri ikki nakar luddittur, ikki ein, ið mutar ímóti einhvørjum tøknisligum framburði. Eg góðtaki, at vit ikki kunna spola aftur til áðrenn talgildistíðina.

Men eg eri somuleiðis ímóti eini tankaleysari determinismu, ið fer við øllum tøknisligum framburði sum óundansleppandi, og tí "av tí góða". Menniskjað skapti tøknifrøðina, og tað er upp til okkum at taka ábyrgd fyri avleiðingunum av Web 2.0-kollveltingini. Talgildir fantastar hava krýnt "borgarajournalistin" sum teirra útskeldaða uppreistrarhetja, sín endurfødda Trotsky.

Mín hetja, hinvegin, er ikki hasin einstaklingadyrkandi facebookandi frikurin fullkomiliga bundin at hvat onnur halda um seg og síni, men tann borgarin, ið ásannar sína fávitsku um ávís viðurskifti, sum heldur sín kjaft og brúkar alnetið, og fjølmiðlar yvirhøvur, at læra um og njóta verðina frá øðrum, betri upplýstum og gávaðum persónum.

Um mítt fráfall ger meg ómodernaðan, íðan, 'so be it'! Onkur má siga sum er um alnetið í dag. Onkur má greiða frá teim samfelagsligu og moralsku avleiðingum av eini Web 2.0-verð, har vakurleiki, snildargávur og vitan verða amatøriserað av einum skítbýttum online-pakki.

Tíðargreinin